LØGTINGSINS
UMBOÐSMAÐUR

Tórshavn, tann 31. mai 2011
J.Nr.: 201000067 / 18
(at tilskila í svari)

**Álit**
viðvíkjandi klagu um sýtan av innliti í starvsfólkamál

Við teldubrævi 17. august 2010 hevur A, blaðstjóri sent umboðsmanninum eina klagu um vantandi svar frá Hvannasunds kommunu uppá eina innlitsáheitan, dagfest 24. juli 2010.

Innlitsáheitanin var soljóðandi:

> "Fari við hesum at søkja um meirinnlit í viðurskiftini viðvíkjandi dagstovninum, sum Hvannasunds kommuna skal byggja í næstum.
>
> Vit hava fyrr spurt bygdaráðsformannin um leiklutin hjá byggifrøðinginum, B, sum vegna dagstovnin á Fossanesi, Norðdepli, undirskrivar brøv vegna Hvannasunds kommunu. Tá vit ikki hava fingið svar uppá tann spurningin, verður biðið um alment innlit í leiklutin hjá byggifrøðinginum.
>
> Sambært upplýsingum okkara er B í føstum starvi hjá Klaksvíkar kommunu. Nær er B, komin í fast starv hjá Hvannasunds kommunu ? Hvat inniber hetta starv ? Biðið verður um skjalatilfar um treytirnar fyri samstarvinum, sáttmála og lýsing av starvinum, og treytir - eisini fíggjarligar.
> … "

Av tí at Hvannasunds kommuna svaraði innlitsáheitanini eftir, at umboðsmaðurin hevði sent kommununi klaguna til ummælis, verður bert tann parturin av málinum viðgjørdur, sum snýr seg um grundgevingina hjá kommununi fyri at sýta klagaranum innlit.

## Málsgongd
Víst verður til frágreiðingina hjá Hvannasunds kommunu undir partshoyringini.

## Partshoyring
Umboðsmaðurin gjørdi av at kanna hetta málið nærri, og við skrivi, dagfest 17. august 2010 varð klagan send Hvannasunds kommunu til ummælis við einari freist áljóðandi 3 vikur. Samstundis varð Hvannasunds kommuna biðin um at lata umboðsmanninum øll skjøl í málinum til láns.

Tann 30. august 2010 sendi Hvannasunds kommuna umboðsmanninum soljóðandi viðmerkingar:

> **"Viðv. klagu um innlit fra A**
> A hevur av góðum orsøkum ikki fingið svar uppá seinnu umbønina um innlit sum hann hevur sent á t-post 24. juli. Hvannasunds kommuna hevði stongt vegna summarferiu fra 19. juli til 15. august.
>
> Umbønin um innlit, sum A bað um 5. juli, er farin fra Hvannasunds kommunu 15. juli.

Traðagøtu 43 · Postrúm 2008 · FO-165 Argir · Tlf 358500 · Faks 358501 · lum@lum.fo · www.lum.fo

Viðvíkjandi svar um meirinnlit er tað svarað í dag."

Saman við frágreiðingini hjá kommununi var viðlagt soljóðandi skriv til A, dagfest 30. august 2010:

> **"Viðv. meirinnlit í bygging av barnagarði**
> B er ikki í føstum starvi hjá Hvannasunds kommunu.
> Kommunustýrið samtykti einmælt á fundi 11. februar 2009 at halda fram við B sum tekniskur ráðgevi hjá kommununi.
>
> Kommunan metir hetta sum eitt persónsmál og vísur tí til lógina um innlit í fyristiningina.
> …."

Við skrivi, dagfest 3. september 2010, vórðu viðmerkingarnar hjá Hvannasunds kommunu sendar klagaranum til ummælis við einari freist áljóðandi 14 dagar, sum tann 16. september 2010 boðaði frá síni ónøgd um, at hann ikki fekk innlit í viðurskiftini viðvíkjandi tekniska ráðgevanum.

Tann 20. september 2010 heitti umboðsmaðurin í skrivi á Hvannasunds kommunu við eini freist áljóðandi 3 vikur um at greiða nærri frá grundgevingini um, at persónsmál kunnu undantakast frá rættinum til innlit og vísa á lógarásetingar í innlitslógini, ið eftir kommununar fatan kundu stuðla grundgevingini.

Tann 25. oktober 2010 sendi umboðsmaðurin Hvannasunds kommunu eina áminning um málið.

Við skrivi, dagfest 10. november 2010, sendi Hvannasunds kommuna umboðsmanninum soljóðandi skriv:

> **"Svar til skriv tygara dagf. 20. september 2010 viðv. klagu um innlit fra A**
> Hvannasunds kommuna gevur ikki A innlit í málið við B, sambært lógina um innlit í fyrisitingina
>
> *§ 12 Rætturin til skjalinnlit fevnir ikki um upplýsingar um*
> *1) Privatu, herundir fíggjarligu, viðurskiftini hjá einstaklingum.*
>
> B er privatpersónur/einstaklingur, sum er løntur av Hvannasunds kommunu, og verður øll løn goldin umvegis skattaskipanina. Hann fær løn goldna fyri arbeiddar tímar smb. sáttmála hjá Akademikarafelag Føroya.
>
> Vónandi eru hesar upplýsingar nøktandi."

Tann 17. november 2010 boðaði umboðsmaðurin pørtunum frá, at av tí at tað ikki varð mett at verða neyðugt við framhaldandi partshoyringum, varð farið undir endaligu viðgerðina av hesum málinum.

**Niðurstøða**

Hetta mál snýr seg um, at Hvannasunds kommuna hevur noktað klagaranum innlit í starvstreytirnar og lønarviðurskiftini hjá einum tekniskum ráðgeva hjá Hvannasunds kommunu. Kommunan sýtti klagaranum innlit við teirri grundgeving, at tað snúði seg um eitt persónsmál, og vísti generelt til innlitslógina.

Um starvsviðurskiftini hjá tekniska ráðgevanum hevur kommunan upplýst, at hann er settur at loysa eina uppgávu fyri kommununa í sambandi við bygging av barnagarði, og at hann verður løntur fyri teir tímarnar, hetta arbeiðið tekur.

At viðkomandi er løntur av kommununi merkir, at upplýsingar starvinum viðvíkjandi eru at meta sum ítøkilig starvsfólkaviðurskifti, sum eru fevnd av rættinum til innlit, jbr. § 4, stk. 1 í innlitslógini (løgtingslóg nr. 133 frá 10. juni 1993 um innlit í fyrisitingina). Upplýsingar og skjøl í hesum málum kunnu bert undantakast, um §§ 7 – 14 heimila hesum.

Í frágreiðing til umboðsmannin hevur kommunan víst til § 12, stk. 1, nr. 1 í innlitslógini sum grundgeving fyri at sýta klagaranum innlit í umbidnu upplýsingarnar.

§ 12, stk. 1, nr. 1 í innlitslógini er soljóðandi:

"**§ 12.** Rætturin til skjalainnlit fevnir ikki um upplýsingar um
1) privatu, herundir fíggjarligu, viðurskiftini hjá einstaklingum,
2) …"

Fyri at undantaka upplýsingar við heimild í § 12, stk. 1, nr. 1 skal talan vera um upplýsingar, sum avdúka nakað, sum hoyrir privatlívinum til. Snúgva upplýsingarnar seg um fíggjarlig viðurskifti, skal talan vera um upplýsingar, sum avdúka nakað um privatu fíggjarstøðuna hjá viðkomandi. Sum dømi um upplýsingar, sum kunnu avdúka nakað um privatu fíggjarstøðuna hjá einum persóni kunnu nevnast upplýsingar um, at viðkomandi móttekur forsorgarhjálp ella aðra almannaveiting, sum kann avdúka nakað um privatu fíggjarligu støðuna hjá viðkomandi.

Upplýsingar um hvat eitt starv inniber, og hvørjar uppgávur eitt starv fevnir um, eins og upplýsingar um, hvat ein persónur fær í løn frá einum almennum arbeiðsgevara, eru, hóast talan er um upplýsingar, sum kunnu sigast at viðvíkja einstaklingum, upplýsingar, sum viðvíkja sjálvum starvinum, sum fyrr nevnt fevndar av rættinum til innlit.

Hvat ein persónur fær í løn frá einum almennum arbeiðsgevara er ikki at meta sum upplýsingar um privat fíggjarlig viðurskifti, ella sum eru við til at avdúka nakað um privatu fíggjarstøðuna hjá viðkomandi, og eingin heimild er í innlitslógini fyri at sýta innlit í hesar upplýsingar.

Vísandi til viðmerkingar mínar omanfyri fari eg at mæla Hvannasunds kommunu til at taka innlitsumbønina uppaftur til viðgerðar. Eg fari samstundis at biðja kommununa lata meg frætta, hvat víðari hendir í málinum.

Burtursæð frá hesum viðmerkingum og tilmæli haldi eg ikki grundarlag vera fyri at gera meira við málið í løtuni.

Sólja í Ólavsstovu
Umboðsmaður